# Petur Skeel Jacobsen áttati

**Í dag verður Føroya kendasti veðurmaður, Petur Skeel Jacobsenn áttati**

FØÐINGARDAGUR
*Sosialurin*




*Petur Skeel og Nólsoyar Páll lýta suður í hav... Petur Skeel Jacobsen er til arbeiðis á Sosialinum hvønn dag, har hann spáar um veðri. Í dag verður hann áttati, og dagin heldur hann í Danmark saman við familjuni*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Petur Skeel varð føddur í Tungugøtu í Havn tann 28. juni í 1925. Pápin, Mourits E. Jacobsen, var ættaður úr Kaldbak og mamman av Eiði. Hon doyði í barsilssong við Petur Skeel. Sum seks ára gamal flutti Petur Skeel til Kaldbaks og vaks upp hjá ommubeiggjanum, Petur Skeel Nolsøe, sum var bóndi í Kaldbak.

Sum 19 ára gamal fór Petur til Havnar á Preliminerskúla. Hetta var undir krígnum, og skúlin hevði hølistrupulleikar, tí gingu tey í skúla í Realskúlanum - aftan á døgurða frá kl trý til út á kvøldið. Skúlin flutti aftur á VBV seinni, og Petur Skeel tók prógv har í 1946.

Petur fór tá í læru á Gjaldstovuni og arbeiddi har í nøkur ár, til hann sá eina lýsing eftir fólki at koma at starvast á veðurstøðini, sum kom í 1946, og sum helt til á Skanskanum. Petur Skeel søkti og fekk starvið.

Úti á Skansanum vóru einki serligar umstøður hjá Veðurstøðini - men seinni flutti støðin í stásiligari høli úti í Grønlandi - á Svalbardsvegnum.

Fram til 1962 arbeiddi Petur Skeel skiftivís á Gjaldstovuni og á veðurstøðini. Men í 1962 fór hann til Danmark og fór í starv hjá Meteologisk Institut.

Petur Skeel var í Danmark í 29 ár - frá 1962 til 1991. Men tað var av tilvild, at hann kom aftur til Føroya.

Veðurfrøðingurin á flogvøllinum var komin til pensiónsaldur og fór frá. Tí varð Petur Skeel spurdur, um hann vildi fara til Føroya at taka yvir.

Í 1993 flutti veðurtænastan av flogvøllinum til Havnar - at húsast hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni Yviri við Strond.

Í 1990 - tá Petur Skeel gjørdist sjeyti, fór hann frá sum veðurmaður. Tá var hann rættuliga vorðin fólkaogn sum tann hugnaligi veðurmaðurin í »Góðan morgun Føroyar« í útvarpinum, har hann dagliga spáddi um veðrið.

Kona Petur, Malla, sum var ættað úr Rituvík, doyði í 1987. Tey eiga tríggjar deringir, sum allir búgva í Danmark við familjum.

Síðani 1996 hevur Petur Skeel verið fastur fúsur her í Sosialinum. Hann er á blaðnum hvønn dag, har hann skrivar veðurtíðindini á baksíðuni. Hann lesur ymisk veðurkort, og út frá teimum og veðurforsagnunum frá DMI, ger hann so sínar veðurforsagnir.

Petur Skeel hevur eisini ymisk frítíðarítriv. Honum dámar sera væl at dansa, bæði føroyskan dans, sum hann altíð hevur gjørt nógv við - eisini árini í Danmark. Hann er eisini fastur fúsur í dansifelagnum Dansifrøi.

Petur Skeel býr í egnum húsum í Tórsbyrgi í Havn. Hann er farin til Danmark at halda dagin saman við familjuni. Adressan er: Nørupvej 28, 2610 Rødovre.

Vit á Sosialinum ynskja honum hjartaliga tillukku við degnum!

## VEÐRIÐ




**Í dag**
Fleyr til andøvsgul av útsynningi. Fyrst skíggjað veður, kanska fer at regna av og á, men sum líður klárt veður. Hitini millum 8 og 13 stig.




**Mikudagin**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðuri, snarar í ein landnyrðing, Skiftandi skýloft og mest turt veður og nakað av sól. Hitin millu, 8 - 13 stig




**Hósdagin**
Gul til stívt andøvsgul. Skiftandi skýloft og turt veður við nakað av sól, hitin millum 8 og 13 stig.

**Fríggjadagin**
Gul til stívt andøvsgul. Skýggjað og regn, somu hitaviðurskifti.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 11 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 16 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 28 |
| Athen | -- |
| Malta | 32 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 15 |
| New York | 32 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 995 hPa, vestan fyri Lofoten flytir seg hendanvegin. Ein veikur hátrýstsryggur, 1015 hPa, breiðir seg inn yvir Føroyar av útsynningi, og milt og vát luft streymar yvir Føroyar av landsynningi



Lot til andøvsgul, turt veður og tíðliga á degnum møguleiki fyri sól. Út á kvøldi snarar vindurin í landsynning, og í nátt verður mest skýggjað og támut veður við møguleikum fyri mjørkaflókar. Hitin alt samdøgrið um 10 stig

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/6 kl. 06⁰⁰– 27/6. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,3°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 26/6 kl. 06⁰⁰– 27/6 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 71,0 mm

## LOTTO

**Vika 25 – 25. juni**
Vinnaratøl: **02 - 15 - 22 - 25 - 26 - 29 - 34**

Eykatøl: **05 - 19**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | **5.089.253,- kr.** |
| 6 vinnarat.+ eykatal: | **45.477,- kr.** |
| 6 vinnaratøl | **3.131,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **131,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **39,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**Vika 25 – 25. juni**
Jokaratal: **6 - 5 - 8 - 6 - 6 - 3 - 7**

| | |
|---|---|
| Øll 7 røtt: | **Eingin/0,- kr.** |
| 6 aftastu røtt: | **328.630,- kr.** |
| 5 aftastu røtt: | **26.728,- kr.** |
| 4 aftastu røtt: | **2.188,- kr.** |
| 3 aftastu røtt: | **253,- kr.** |
| 2 aftastu røtt: | **49,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## TIPS 13 úrslit
**Vika 25 – 25. juni**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | FK Sileks - Beitar Jerusalem | 2 |
| 2. | Gent - Bohemians FC | 1 |
| 3. | IFK Göteb. - FC Vict.Rosport | 1 |
| 4. | FC Vict. Rosp. - IFK Göteb. | 1 |
| 5. | Lisb. Distill. FC - Zalgiris Viln. | 2 |
| 6. | Lokeren - Trans Narva | 2 |
| 7. | Neuch.Xamax - Ararat Yerew. | 1 |
| 8. | NK Drava Ptuj - Slaven Bel. | 2 |
| 9. | Pogon Szczecin - Tiligul Tiraspol | 1 |
| 10. | Sturm Graz - FC Rangers | 1 |
| 11. | Varteks - Dinamo Tirana | 1 |
| 12. | Assyriska - Elfsborg | x |
| 13. | Hammarby - Gefle | 2 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | **181.220,- kr.** |
| 12 røtt: | **467,- kr.** |
| 11 røtt: | **42,- kr.** |
| 10 røtt: | **Eingin/0,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

23. juni — Mánin næst jørðini
28. juni — Seinna kvarter
8. juli — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. Juni | 00.37 | 13.14 | - | 12.14 | - | 12.29 | 02.37 | 15.14 | 03.37 | 16.14 | 11.29 | - | 10.29 | 23.05 | 00.52 | 13.29 | 01.52 | 14.29 | 00.22 | 12.59 | 01.37 | 14.14 |
| 29. Juni | 01.50 | 14.26 | 00.50 | 13.26 | 01.05 | 13.41 | 03.50 | 16.26 | 04.50 | 17.26 | 00.05 | 12.41 | 11.41 | - | 02.05 | 14.41 | 03.05 | 15.41 | 01.35 | 14.11 | 02.50 | 15.26 |
| 30. Juni | 02.48 | 15.11 | 01.48 | 14.11 | 02.03 | 14.26 | 04.48 | 17.11 | 05.48 | 18.11 | 01.03 | 13.26 | 00.03 | 12.26 | 03.03 | 15.26 | 04.03 | 16.26 | 02.33 | 14.56 | 03.48 | 16.11 |
| 1. juli | 03.30 | 15.56 | 02.30 | 14.56 | 02.45 | 15.11 | 05.30 | 17.56 | 06.30 | 18.56 | 01.45 | 14.11 | 00.45 | 13.11 | 03.45 | 16.11 | 04.45 | 17.11 | 03.15 | 15.41 | 04.30 | 16.56 |
| 2. Juli | 04.18 | 16.41 | 03.18 | 15.41 | 03.33 | 15.56 | 06.18 | 18.41 | 07.18 | 19.41 | 02.33 | 14.56 | 01.33 | 13.56 | 04.33 | 16.56 | 05.33 | 17.56 | 04.03 | 16.26 | 05.18 | 17.41 |

5 707265 100029 >